# Vøggustovubørn vitjaðu Miðlahúsið

Mánadagin var forkunnug vitjan í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Talan var um ellivu børn, sum til dagligt ganga í býlingshúsinum við Maritugøtu í Hoyvík. Tey ellivu børn ganga á stovuni, sum eitur Haruurðin.

Hendan dagin, ið tey vitjaðu, høvdu tey fyrst verið í SMS, har tey høvdu hugt at snotiliga jólabýnum. Øll høvdu tey nissuhúgvu á høvdinum, so tað var ikki frítt, at fólk løgdu merki til tey, tá ið tey spákaðu sær oman gjøgnum býin. Onkur gamal maður segði við tey, hvussu harmur hann var, at hann ikki hevði myndatólið við sær, tí hann helt tey verða so fitt.

Komin oman í miðbýin gekk leiðin inn í Miðlahúsið, har tey settu seg væl tilrættis at eta. Tey fýra starvsfólkini á stovuni hjá børnunum høvdu bílagt fisk og kips til børnini, og saman við sunkistum frá Pop Top, sum Miðlahúsið lat teimum, hugnaðu tey sær óført.

Gamla leyvan hjá Valdemar Lützen, sum stendur í trappuni í Miðlahúsinum, vakti ans hjá børnunum, og tey blivu eisini avmyndað saman við leyvuni, áðrenn tey hildu heim aftur í býlingshúsið.

**tn**




Fr.Restorff

## Frá Frants Restorff

**Opið um jólini:**

| | |
|---|---|
| Jólaaftan | 6.30-12.00 |
| 1. jóladag | Stongt |
| 2. jóladag | Stongt |
| Týsdagin 27. desember | opið sum vanligt |

**Opið um ársskiftið:**

| | |
|---|---|
| Nýggjársaftan | 6.30-13.00 |
| Nýggjársdag | Stongt |
| Mánadag 2. januar | opið sum vanligt |

Vit ynskja øllum eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár og takk fyri tað brátt farna




